# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-At eitt støðugt tíðarskeið er av merkir ikki, at vit fara undir eitt óstøðugt tíðarskeið ístaðin fyri*

*Raúl Castro)*

# Marran hjá demokratunum stillar uppaftur

**Bæði Hillary Clinton og Barrack Obama stúra fyri, at Ralph Nader kann taka so nógvar atkvøður frá demokratunum í heyst, at flokkurin tapir forsetavalið**



*Ralph Nader hevur fyrr kostað demokratunum valsigurin. Nú er hann aftur á pallinum (Mynd: AP)*

Ralph Nader hevur stillað upp til fleiri forsetaval, og í 2000 var hann beinleiðis orsøkin til, at demokratarnir taptu valið. Ta ferðina fekk Nader 97.000 atkvøður í Florida, og tað gjørdi, at Al Gore tapti valið í Florida og forsetavalið.

Í 2004 stillaði Raplp Nader uppaftur, men ta ferðina fekk hann onga ávirkan á tað endaliga úrslitið. Men tað kann hann fáa í heyst.

- Eg minnist, tá hann stillaði upp seinast. Tað var ikki gott fyri nakran og serliga ikki fyri land okkara, segði Hillary Clinton í nátt. Hon vísti á, at Ralph Nader leggur dent á, at hann er ein "grønur" politikari, og so var hann beinleiðis orsøkin til, at USA ikki fekk sín grønasta forseta nakrantíð, tá Al Gore tapti ímóti George W. Bush í 2000.

Barrack Obama hevur eisini gjørt greitt, at hann er alt annað enn fegin um avgerðina hjá Ralph Nader at stilla upp.

- Fyri átta árum síðani segði hann, at tað var eingin munur á Gore og Bush. Nú átta ár seinni munnu øll hava skilt, at hann ánaði ikki, hvat hann tosaði um, segði Obama við CNN í nátt.

### Fegnir republikanar

Sjálvur vísir Ralph Nader atfinningunum aftur. Hann heldur, at demokratarnir eiga at vinna forsetavalið í ár, sama um hann stillar upp ella ikki.

- Vinna demokratarnir ikki stórsigur í ár, kunnu teir stinga í sekkin og byrja av nýggjum, sigur hann.

Í republikanska flokkinum hava tey avgjørt einki ímóti, at Ralph Nader stillar upp.

- Eg haldi, at hann kann taka nakrar atkvøður frá demokratunum, so hann er sjálvandi vælkomin á pallin, sigur Mike Huckabee, sum framvegis dystast við John McCain um uppstillingina hjá republikanarunum.

# Raúl fer at lurta eftir Fidel

**Raúl Castro er nú forseti í Kuba, men tann fráfarni Fidel fer framvegis at ávirka kubanskan politikk**

Tann 76 ára gamli Raúl Castro nikkaði og brosaði, tá kubanska tjóðartingið valdi hann til forseta í gjárkvøldið. Formliga var Raúl varaforseti frammanundan, og í tað starvið valdi tingið tann 77 ára Jose Ramon Machado Ventura.

Tann nývaldi forsetin segði aftan á valið, at hóast Fidel Castro er farin frá, verður tann 81 ára gamli fyrrverandi forsetin framvegis ein týðandi partur av kubanska politikkinum. Raúl segði eisini, at hann fer at spyrja tann eldra bróðurin um góð ráð, áðrenn stórar politiskar avgerðir verða tiknar. Umframt eitt slag av forsetaráðgeva heldur Fidel Castro fram í leiðsluni í kommunistaflokkinum, og hann er eisini limur í tjóðartinginum.

Politiskir eygleiðarar í Kuba vænta ikki, at broytingin í teirri ovastu politisku leiðsluni fær nakra stórvegis ávirkan á landsins politikk. Amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, segði í gjárkvøldið, at leiðsluskiftið í Havana var ein týðandi løta í kubansku søguni, men at kubanar hava rætt til at velja sínar leiðarar á demokratiskan hátt. Samstundis mælti hon kubansku stjórnini til at fara undir eina demokratiska nýskipan og at lata politiskar fangar leysar. Harafturat eggjaði hon Kuba til at virða mannarættindini og at fáa sær eina frælsa valskipan.

### Royndur eftirmaður

Raúl Castro stendur ikki á berum, nú hann hevur tikið við sum kubanskur forseti, tí hann hevur drúgvar royndir í landsins og floksins leiðslu. Hann hevur verið verjumálaráðharri síðani kollveltingina í 1959, og hann hevur verið næstformaður í kommunistaflokkinum síðani 1965.

Raúl hevur verið roknaður sum høgra hond hjá Fidel Castro øll tey 49 árini, Fidel hevur sitið við valdið, og tað var eisini hann, sum bleiv valdur til virkandi forseta, tá Fidel mátti leggjast undir skurð fyri eina tarmsjúku á sumri í 2006.



*Nýggi leiðarin í Kuba, Raúl Castro, verður vanliga roknaður sum ein av teimum hóvligu leiðarunum í Havana*

**STUTT SAGT**

## Mugabe roynir aftur

Hóast hann er vorðin 84, hevur Robert Mugabe ongan hug at gevast í zimbawbiska forsetaembætinum. Tvørturímóti hevur hann nú boðað frá, at hann stillar upp aftur til forsetavalið, sum verður tann 29. mars. Sama dag verða tjóðartings- og kommunuval. Vinnur Mugabe forsetavalið, kann hann fara undir sítt sætta skeið sum forseti. Andstøðan hevur eisini sítt valevni, og tað er sum væntað andstøðuleiðarin Morgan Tsvangrei. Búskaparliga støðan í Zimbabwe er syndarlig. Inflasjónin er um 100.000 prosent, og arbeiðslotsið er 80 prosent.

## Óskettin formaður

Michael Martin, sum er formaður í niðaru deild í bretsla parlamentinum, er komin í álvarssamar trupulleikar, nú blaðið Sunday Times hevur avdúkað, at hann hevur latið tað almenna rinda fyri útreiðslur, sum einki hava við formansstarv hansara at gera. Eitt nú hevur blaðið prógvað, at Michael Martin hevur latið tað almenna rinda einar 12.000 krónur fyri hýruvognar, sum kona hansara hevði leigað. Tingformaðurin hevur fyrr sagt, at konan hevði leigað bilarnar í almennum ørindum fyri seg og ein embætismenn, men hetta vísti seg ikki at vera so. Harafturat hevur Sunday Times avdúkað ymiskt annað óskil við fíggjarligu viðurskiftunum millum tingformannin og tað almenna, og hetta kann lættliga kosta honum formansheitið, skrivar Reuters úr London.

## Vindmyllur í mótvindi

Nógvir danskir politikarar vilja hava eina frágreiðing um, hvussu tað ber til, at tríggjar vindmyllur eru brotnaðar tvørturav teir seinastu dagarnar. Lukkutíð hevur einki fólk fingið skaða, sjálvt um petti av myllunum fóru langan veg. Allar tríggjar myllurnar eru frá stóru verksmiðjuni Vestas, sum hevur lovað at kanna, hví teir tríggjar myllurnar brotnaðu.